Dagf. 1. juni 2022
HMR j. nr. 22/10075-9

Kaj Leo Holm Johannesen
landsstýrismaður

Svar

upp á

fyrispurning nr. 52-193/2021 eftir §52a í tingskipanini um heilsuviðgerðartúrar til Kroatia fyri gikta- og psoriasissjúklingar, frá Edvu Jacobsen, løgtingskvinnu

Spurningarnir vóru soljóðandi:

1. Hvussu mong eru sloppin við til heilsuviðgerðartúrar til Kroatia árliga seinastu 10 árini í sambandi við giktasjúku?

2. Hvussu mong eru sloppin við til heilsuviðgerðartúrar til Kroatia árliga seinastu 10 árini í sambandi við psoriasis?

3. Hví eru hesir heilsuviðgerðartúrar um at blíva burtur sum viðgerðarháttur hjá Heilsuverki Føroya?

4. Er tað rætt skilt, at bara ein við gikt og eingin við psoriasis sleppur við í ár.

   - um ja, hvør er grundgevingin og hvørjar eru ætlanirnar frameftir um heilsuviðgerðartúrar fyri fólk við gikt og psoriasis?

   - um nei, hvørjar ætlanir eru í ár og frameftir um heilsuviðgerðartúrar fyri fólk við gikt og psoriasis?

Svar:

Til spurning 1 og 2
Tað er Sjúkrahúsverkið, ið varðar av og umsitur serviðgerðir uttanlands.

Tað er Landssjúkrahúsið, sum í fleiri ár hevur sent sjúklingar við psoriasis og gikt til klimaviðgerð í Naftalan í Kroatia. Sambært Sjúkrahúsverkinum er hetta gjørt í samstarvi við avvarðandi sjúklingafeløg og donsku ferðaskrivstovuna "Et bedre liv". Siðvenjan hevur verið, at umleið 20 sjúklingar hava fingið í boði hesa klimaviðgerð árliga. Í talvuni niðanfyri er talið av sjúklingum fyri tíðarskeiðið 2012-2021.

	2012	**2013**	**2014**	**2015**	**2016**	**2017**	**2018**	**2019**	**2021**	**íalt**
Tal av sjúklingum	21	21	17	19	20	20	21	20	20	179

Árini 2012 til 2014 vóru tað einans fólk við psoriasis, sum fingu í boði klimaviðgerð, men síðani 2015 hava umleið eins nógvir giktasjúklingar sum psoriasissjúklingar verið í Kroatia til klimaviðgerð. Til talvuna er at viðmerkja, at í 2012 vóru fimm sjúklingar í Ísrael og í 2013 var ein í Íslandi, annars hava allir verið í Kroatia.

Sambært Sjúkrahúsverkinum hevur mannagongdin í stuttum verið tann, at tey við psoriasis ella gikt, ið hava mett seg hava tørv á viðgerð, eru biðin um at fara til sín kommunulækna, tá tíðin nærkaðist at søkja um pláss til klimaviðgerð. Áhugafeløgini hjá hesum sjúklingabólkum hava staðið fyri at lýsa í miðlunum. Kommunulæknin hevur mett um og sent ávísing til serlækna á Landssjúkrahúsinum. Serlæknarnir hava síðani, út frá eini læknafakligari meting, valt tilsamans 20 fólk út – vanliga 10 við psoriasis og 10 við gikt.

Til spurning 3

Sjúkrahúsverkið hevur fyri stuttum upplýst fyri landsstýrismanninum, at tey hava broytt mannagongdina. Broytta mannagongdin skal sambært Sjúkrahúsverkinum m.a. síggjast í ljósinum av, at tað eru hend stór framstig í viðgerðini seinnu árini, og eitt nú er viðgerðin við lívfrøðiligum heilivági ment heilt nógv til hesar báðar sjúklingabólkarnar. Sambært Sjúkrahúsverkinum fáa teir allarflestu sjúklingarnir betri úrslit við nýggju viðgerðarmøguleikunum enn við klimaviðgerð, og tí hava tey tikið avgerð um at broyta ávísingarháttin soleiðis, at færri nú fáa bjóðað klimaviðgerð. Í 2022 er higartil bert ein sjúklingur við psoriasis visiteraður til klimaviðgerð í Kroatia, og sambært Sjúkrahúsverkinum sæst sama rák eisini í Danmark.

Til spurning 4

Sambært Sjúkrahúsverkinum ber framvegis til við nýggju mannagongdini at verða ávístur til klimaviðgerð, men har serlækni í hvørjum einstøkum føri ger eina ítøkiliga meting út frá "Nationale kliniske retningslinjer", sum danska Heilsustýrið gevur út.

Sambært Sjúkrahúsverkinum brýtur hetta frá gomlu mannagongdini, har tað frammanundan var givið at tilsamans 20 fólk – vanliga 10 við psoriasis og 10 við gikt – sluppu avstað.

Heilsumálaráðið, 1. juni 2022

Kaj Leo Holm Johannesen
landsstýrismaður